# Fíggjarmálaráðið
# Lønardeildin

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 21.02.25 |
| Mál nr.: | 21/07172 |
| Málsviðgjørt | RG |

## Frágreiðing um varskógvaraskipan

Í 2019 varð varskógvaralógin (varskógvaraskipanin) fyri alment sett starvsfólk sett í gildi. Sambært lógini, skal landsstýrisfólkið í fíggjarmálum leggja frágreiðing fram fyri løgtingið, har lýst verður, hvørt lógin virkar eftir ætlan, og um broytingar ella tillagingar skulu gerast.

**Endamálið við varskógvaraskipanini**

Lógin er galdandi fyri allar partar av almennu fyrisitingini, undantikið kommunur og kommunal virkir og stovnar. Yvirskipaða endamálið við skipanini, er at tryggja greiðar reglur um fráboðan av óreglusemi o.l. í fyrisitingini. Eisini skal hon verja starvsfólkið, ið boðar frá.

Í almennu viðmerkingunum til lógina stendur, at endamálið: "*er at stuðla opinleika og gjøgnumskygni, tá ið talan er um ólógliga fyrisiting og álvarsamt óreglusemi í fyrisitingini og á tann hátt tryggja, at fyrisitingin er í samsvari við lóggávuna... eins og endamálið er at tryggja, at upplýsingarnar, sum verða latnar um eina varskógvaraskipan, á konstruktivan hátt verða brúktar til at fyribyrgja og forða fyri lógarbrotum og skeivari fyrisiting.*"

Hesi viðurskifti eru fevnd av varskógvaraskipanini

1) Týðandi ella afturvendandi feilir, óreglusemi og vansketni í málsviðgerð, fyrisiting og borgaraavgreiðslu,
2) Týðandi brot á innanhýsis mannagongdir og rundskriv,
3) Grundaður illgruni um grov lógarbrot og grundaður illgruni um, at løgfrøðiligu skyldur landsins verða skúgvaðar til viks, og
4) Starvsfólk, ið hava verið fyri neiligum starvsrættarligum avleiðingum, tí tey hava boðað frá óregluligum viðurskiftum o.tíl.

Onnur mál, ið kunnu fráboðast eru millum annað: mál um korruptión, nepotismu, mutur, skjalafalsan, svik, fíggjarundandrátt, óreglulig viðurskifti í sambandi við bókhald og grannskoðan, harðskap og kynsligan ágang. Eisini fevnt av skipanini er grundaður illgruni um, at landsins

løgfrøðiligu skyldur verða skúgvaðar til viks, tá ið talan er um fráboðanarskyldu eftir aðrari lóggávu, millum annað innan heilsuøkið, almannaøkið og skúlaøkið.

Varskógvaraskipanin er fyrst og fremst ætlað at tryggja, at óreglusemi, sum ikki verður loftað av umboðsmanni ella landsgrannskoðara ella av innanhýsis mannagongdum og tílíkum, kemur fram.

**Um skipanina**

Landsgrannskoðanin umsitur skipanina. Stovnurin hevur frammanundan eitt óheft fíggjarligt og fyrisitingarligt eftirlit við landsfyrisitingini, og kostar umsitingin av skipanini áleið 0,2 ársverk.

Skipanin er soleiðis háttað, at Landsgrannskoðanin tekur støðu til, um ein fráboðan skal viðgerast nærri. Tá ið tað er avgjørt at viðgera fráboðanina, verður fráboðanin gjørd navnleys og síðani send avvarðandi aðalstjóra, sum so setur kanning í verk. Tað er aðalstjórin, sum metir um hvørjar avleiðingar ein fráboðan kann hava við sær. Til dømis broytingar í mannagongdum, ella starvsrættarligar avleiðingar.

Í hvørjum einstøkum føri má metast um, hvør rætti kanningarháttur er. Til dømis kann aðalstjórin lata málið víðari til kanningar í ávísum førum:

- Tá ið illgruni er um lógarbrot, kann málið latast løgregluni.
- Tá ið talan er um arbeiðsumhvørvisviðurskifti, kann málið latast Arbeiðs- og brunaeftirlitinum.
- Tá ið talan er um fíggjarviðurskifti, kann aðalstjórin heita á Landsgrannskoðanina um at gera eina grannskoðan.

Eftir at kanningin hjá aðalstjóranum er gjørd, skal frágreiðinging um kanningina sendast Landsgrannskoðanini. Við støði í frágreiðingini ger landsgrannskoðanin eitt ummæli av málinum, og eitt møguligt tilmæli um, hvussu málið skal handfarast. Ummælið verður sent avvarðandi stjórnarráðið til kunningar.

Ein varskógvarafráboðan skal vera navngivin, tá ið hon verður latin Landsgrannskoðanini. Bert avvarðandi málsviðgeri og landsgrannskoðarin hava atgongd til navngivnu upplýsingarnar.

Á heimasíðuni hjá Landsgrannskoðanini, www.lg.fo eru leiðreglur og mannagongdir um skipanina og um, hvussu starvsfólk kunnu senda eina fráboðan.

## Varskógvaraskipanir í øðrum londum

Hóast varskógvaraskipanir eru vanligar í londum rundan um okkum, vísa royndir, at tær ikki verða eins nógv brúktar, sum væntað, tá ið tær vórðu settar í verk. Royndir úr Danmark og Grønlandi, ið hava sambæriligar skipanir, vísa, at í flestu førum eru fáar fráboðanir í mun til talið av fólki, sum kunnu fráboða. Ábendingar eru eisini um, at fleiri fráboðanir eru, tá ið skipanirnar eru nýggjar í mun til, tá ið tær hava verið virknar eina tíð. Her kann leggjast afturat, at í 2014 mælti ES til, at øll lond í ES settu varskógvaraskipanir í verk fyri at verja rættindi hjá varskógvarum. Fleiri lond valdu at fylgja tilmælinum, og í 2019 varð samtykt við lóg, at varskógvaraskipanir skuldu setast í verk í øllum ES limalondum.

## Varskógvaraskipanir í kommunum

Varskógvaraskipanin er avmarkað til landsins stovnar og ráð og tey málsøki, sum hesin geirin umsitur, og tískil eru kommunurnar ikki partur av skipanini.

Seinastu árini eru málsøkini hjá kommununum í munandi voksin. Eitt nú kann nevnast dagstovnaøkið, ið var lagt út til kommunurnar í 2000 og eldraøkið, ið var lagt út í 2015. Sostatt eru tvey stór vælferðarøki, ið ikki eru fevnd av skipanini. Tað kann tað tykjast tilvildarligt, at málsøkini hjá Sjúkrahúsverkinum og Almannaverkinum hava eina varskógvaraskipan, ímeðan dagstovna- og eldraøkið ikki hava.

Spurningurin er tí, um varskógvaraskipanin eigur at víðkast til, at eisini fevna um kommunurnar. Kommunurnar eru sjálvstøðugir eindir, og tí hava tær ikki eins og landsstovnar ein yvirskipaðan myndugleika, sum kann hava sama leiklut, sum aðalráðini hava í varskógvaraskipanini. Verður støða tikin til, at kommunurnar eisini skulu verða fevndar av skipanini, so er neyðugt at skipa fyri einari tilgongd, har kommunurnar verða partur av einari ætlan.

## Gongdin higartil

Síðan varskógvaralógin varð samtykt hevur Landsgrannskoðanin fingið  27 varskógvarafráboðanir. Av hesum eru fimm fráboðanir farnar til viðgerar, og eru hesi mál lýst niðanfyri.

## Viðgjørd mál

Fyrsta málið snúði seg um trý viðurskifti á einum stovni, har tað millum annað varð varskógvað um próvtøkusvik. Landsgrannskoðanin tók undir við niðurstøðuni hjá aðalstjóranum í tveimum av teimum trimum viðurskiftunum. Í triðja málinum metti Landsgrannskoðanin ikki, at aðalráðið hevði viðgjørt málið nøktandi. Í sambandi við kanningina, sendi aðalstjórin avvarðandi stovnsleiðslu frágreiðingina hjá Landsgrannskoðanini. Landsgrannskoðanin metti ikki, at hátturin, ið aðalráðið nýtti at kanna málið, var hóskandi.

Eitt mál snúði seg um møguliga nepotismu í sambandi við eina starvssetan. Niðurstøðan var, at villan ikki var nóg týðandi til, at grundarlag var fyri at krevja, at setanin átti at ganga umaftur.

Landsgrannskoðanin tók undir við niðurstøðuni hjá aðalráðnum.

Annað mál snúði seg um fíggjarviðurskifti og útbjóðing á einum stovni. Eftir viðgerð av málinum, metti aðalráðið ikki, at grundarlag var at gera meira við málið.

Landsgrannskoðanin tók undir við niðurstøðuni. Málið var eitt vanligt mál hjá Landsgrannskoðanini og hevði tí verið grannskoðað óansæð.

Harumframt hevur eitt mál verið um kynsligan ágang. Fyri at tryggja at kanningin varð gjørd á nøktandi hátt, heitti aðalstjórin á ein advokat um at kanna málið. Einki skrivligt tilfar var í málinum og tí var neyðugt at tosa við starvsfólk, sum vóru tilstaðar.

Í frágreiðingini og niðurstøðuni stendur, at tað var ósemja millum fólkini, sum høvdu verið við, um hvat fór fram og tískil var ikki gjørligt at gera nakra greiða niðurstøðu um hvat var hent. Hóast tað vóru ósamsvarandi frágreiðingar og tí ikki gjørligt at gera eina greiða niðurstøðu, so metti advokaturin, at avleiðingin av málinum í ringasta føri hevði verið ein uppsøgn av starvsfólkinum, sum í málinum var undir illgruna fyri at hava framt kynsligan ágang. Starvsfólkið, sum varskógvað varð um, var farið úr starvi, og tí metti aðalráðið ikki, at tað var  neyðugt at gera meira við málið. Landsgrannskoðanin tók undir við niðurstøðuni.

Royndirnar frá hesum málinum vísa, at mál um kynsligan ágang, møguliga ikki eru væl egnað at verða viðgjørd í varskógvaraskipanini. Orsøkin hevur verið, at haldgóð skjalprógv ikki hava verið møgulig at útvega í tí málinum, ið higartil er fráboðað. Landsgrannskoðanin vísur í samskifti við Fíggjarmálaráðið at mál um kynsligan ágang hóska seg møguliga betur í aðrari skipan enn í Varskógvaraskipanini. Tó kann tað verða trupult at gera eina endaliga niðurstøðu, tá ið bert eitt mál um kynsligan ágang er fráboðað.

Eitt av málinum er í viðgerð, og tí er ikki gjørligt at lýsa, hvat tað málið snýr seg um.

**Fráboðanir sum ikki eru fevndar av skipanini**

22 fráboðanum eru ikki farnar víðari til viðgerð og er grundgevingin fyri hesum lýst niðanfyri.

Sjey fráboðanir snúðu seg um lønarmál ella um vánaliga leiðslu.
Í viðmerkingum til lógina stendur, at mál um arbeiðstíð, ónøgd við løn ella arbeiðsgevara, dugnaloysi hjá leiðslu, frávera hjá starvsfeløgum, smærri brot á innanhýsis mannagongdir og líknandi skulu ikki viðgerast í skipanini. Slík mál skulu viðgerast eftir vanligu innanhýsis reglunum á stovninum.

Seks fráboðanir vóru avvístar, tí varskógvarin ikki starvast í almennu fyrisitingini.

Varskógvaraskipanin fevnir bert um almennu fyrisitingina. Tí er eitt avmarkað tal av starvsfólki, sum kann nýta skipanina.

Sambært lógini skulu starvsfólk navngivin lata upplýsingar til varskógvaraskipanina.

Higartil eru níggju ónavngivnar fráboðanir komnar. Hetta merkir, at fleiri mál verða avvíst, tí varskógvarin er dulnevndur.

Tað eru fyrimunir og vansar við, at starvsfólk kunnu fráboða dulnevnd. Eitt er vandin fyri ógrundaðum fráboðanum, og at tað tá verður nýtt óneyðug orka upp á fráboðanir uttan innihald. Annað kann vera, at illgruni verður sáddur um viðurskifti hjá starvsfólkum, sum ikki hava gjørt nakað skeivt – happing/ágangur.

Í einum lítlum samfelagi sum Føroyum, kann møguleikin at fráboða dulnevnt vera ein fyrimunur. Í lítlum samfeløgum er léttari at eyðmerkja fólk, og somuleiðis eru persónligu sambondini ofta tøtt. Persónligu avleiðingarnar kunnu tí gerast lutfalsliga ógvusligar í sambandi við fráboðanir.

Um hugt verður eftir donskum skipanum, so eru flestu skipanir soleiðis, at tað er gjørligt at fráboða dulnevnt. Sama er eisini galdandi í grønlendsku skipanini.

**Samanumtøka**
Endamálið við lógini var at fáa greiðar reglur fyri, hvussu starvsfólk í almennu fyrisitingini kunnu boða frá óreglusemi. Somuleiðis skal hon eisini verja starvsfólk, sum boða frá hesum.

Við støði í lóggávuni og vegleiðingum frá Landsgrannskoðanini, verður mett, at mannagongdirnar í skipanini eru greiðar. Samanumtikið verður eisini mett, at starvsfólk kunnu fráboða á tryggan hátt tí, at fráboðanirnar eru dulnevndar, áðrenn tær fara víðari í skipanini.

Ætlanin við varskógvaraskipanini, var somuleiðis at tryggja eina fyrisiting, sum arbeiðir í samsvari við galdandi lóggávu og mannagongdir, og at upplýsingar latnar skipanini verða brúktar á hóskandi hátt til at fyribyrgja óreglusemi.

Við støði í tilfarinum er trupult at koma til nakra beinleiðis niðurstøðu, um skipanin hevur tænt hesum endamáli. Tó er tað helst ein sannroynd, at fyriskipanin er ein av fleiri, sum kunnu virka fyri at fyribyrgja óreglusemi. Her kann leggjast afturat, at tað eisini eru myndugleikar og skipanir, sum tæna líknandi endamáli: Landsgrannskoðanin, kærumyndugleikar, Løgtingsins umboðsmaður og Arbeiðs- og brunaeftirlitið.

**Nakrar av møguligu avbjóðingunum verða nevndar niðanfyri.**

Kravið um at fráboða við navni, kann hava við sær, at starvsfólk aftra seg við at boða frá, tó metir Fíggjarmálaráðið metir, at verandi skipan samanumtikið hóskar seg væl. Varskógvarar verða dulnevndir, áðrenn ein fráboðan verður send víðari, og eru tað bert tveir persónar á Landsgrannskoðanini, ið kenna navnið á varskógvaranum. Við hesi skipan hevur Landsgrannskoðanin møguleika at venda sær til varskógvaran, um upplýsingar vanta í eini fráboðan. Eisini er gjørligt at staðfesta, um ein varskógvari starvast í almennu fyrisitingini.

## Niðurstøða og tilmæli

Skipanin hevur verið virkin í áleið fimm ár. Tað er ikki mett, at nakað mál hevur havt avleiðingar fyri fráboðaran. Heldur ikki er nakað, sum bendir á, at málini hava havt við sær broytingar ella tillagingar í fyriskipanum og mannagongdum.

Mett verður, at skipanin hóskar seg væl undir landsgrannskoðanini, tí stovnurin er uttan fyri almennu fyrisitingina og hevur førleikarnar til at meta um fíggjarlig og fyrisitingarlig viðurskifti.

Út frá givnu upplýsingunum, metir Fíggjarmálaráðnum, at skipanin riggar eftir ætlan, og mælt verður til, at hildið verður fram við verandi skipan.

**Betri kunning um skipanina**

Fíggjarmálaráðið fer at gera meira fyri at varpa ljós á og kunna um varskógvaraskipanina. Hetta verður gjørt við, at ráðið leggur eitt leinki á heimasíðuna, sum vísir til vegleiðingina hjá Landsgrannskoðanini. Somuleiðis fer Fíggjarmálaráðið at heita á aðalráð og stovnar um at kunna síni starvsfólk um skipanina.